## VALGREINAR

# Undirsjóartunnilin

**Gunnar K Nattestad**



Bummpengagjaldið í Vágatunnlinum má vera so lágt sum gjørligt, fyri at sum mest samfelagsnytta kann fáast burtur úr íløguni. Tað er serstakliga umráðandi, at tey ið ferðast ofta fáa so stóran avsláttur, at ferðamynsturi í mest møguligan mun, ikki verður annarleiðis enn um einki bummgjald var.

Fyri at tryggja lægst gjørliga bummgjaldinum, eigur landskassin at framskunda játtaninar til undirsjóartunnilin, soleiðis at øll játtanin í seinasta lagi er goldið tann dagin tunnilin letur upp. Tað er ikki rætt, at tey ið nýta tunnilin skula gjalda rentur av landskassans parti, umframt tað sum beinleiðis er sett at skula gjaldast við brúkaragjaldið.

Hugsa tær til um tað almenna ikki ætlar at játta seinastu 60 mió. til nýggja Smyril fyrr enn tvey ár eftir at hann er settur í sigling, og at rentubyrðan av hesum skal leggjast omaná ferðaseðlakostnaðin! Neyvan høvdu suðuroyingar lætið sær hettar linda og heldur ikki norðoyingar til sína tíð.

Hendan framskundan av játtan er ikki eyðka útreiðsla, men flytan av longu játtaðum peningi. Tað kann ikki sigast at vera annað enn rímiligt at landskassin betalir sín part av eini íløgu í seinasta lagi tá hon er liðug og ikki fleiri ár seinni.

# Sjálvsvirðing, sjálvsálit, undirbrotni

**Eilif Brimheim**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Hetta er fyrstu ferð, eg stilli upp fyri Sjálvstýrisflokkin til løgtingsval, og er tað sjálvandi, tí at eg havi mínar hugsanir um Føroyar og fólkið, her býr.

Treyðugt vil eg sleingja út vallyfti - harafturímóti bjóði eg meg fram sum tann persón, eg eri, fyri tann flokk, sum eg havi álit á, at leggja framtíð Føroya til rættis.

Eg havi ongantíð verið bangin fyri einari uppgávu, og eri eg tað heldur ikki nú.

Nevnt er í bløðunum um fyrbilsloysnir fyri Føroya land - loysnir av ymiskum slag. Men ein lappaloysn er eingin loysn. Okkara stevnuskrá sigur tað greitt: Virkað verður fyri fullum sjálvstýri. Tað at vit í Sjálvstýrisflokkinum vilja sjálvstýri, merkir sjálvandi ikki, at vit kvetta øll bond við Danmark. Vit liggja einaferð soleiðis fyri, at samstarv við Danmark og hini Norðurlondini er og fer altíð at vera neyðugt. Men best er at tosa saman sum líkastillað, sum grannar.

Fólkaatkvøða um sjálvstýri kemur, spurningurin er: Nær?

Sjálvstýrisflokkurin er fyri sjálvstýri - lat tað vera greitt - men vit mugu fara hóvliga fram!

Hetta er okkara land, okkara arvur, okkara søga og okkara framtíð.

Um grundarlagið undir Føroyum ikki er bygt á kletti, men á kálki og sandi, fáa vit ongantíð ment okkum. Við menningini kemur sjálvstýrið.

Floksins stevnuskrá er mítt mál, og mín partur er at bjóða meg fram fyri tann politikk, ið hóvar mær best, og at stríðast fyri tí í góðum samstarvi - í felag fáa vit loyst og bøtt um trupulleikarnar og ment hetta samfelagið.

Men við ongum sjálvsáliti, við ongari sjálvsvirðing, men upp undir angar av undirbrotni, verður alt bara fyribilsloysn.

Set ikki krossin bara av vana - set tín kross við Sjálvstýrisflokkin!

# Valið 2002 - stutt og greitt: Sjálvstýri við skili

**Hans Jacob Hermansen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Sum valevni fyri Sjálvstýrisflokkin í Suðurstreymoyar valdømi fari eg at leggja dent á, at leiðin móti sjálvstýri verður løgd við skili. Tað merkir m.a. at eingin yvirtøka verður framd, fyrr enn formlig, fyrisitingar-, og fíggjarviðurskifti eru fingin upp á pláss. Týddar danskar lógir til føroysk mál er eingin loysn. Vit eiga ikki at sindra hetta samfelagið bara fyri at yvirtaka og harvið halda, at hetta er leiðin til frælsið. Um loysingin gongur út yvir fólksins frælsi, missa vit meiri fyri minni.

Nei, tit, ið ætla tykkum á val 30. apríl, hugsið um, hvussu gongdin er rundan um okkum. Tann, ið hugsar langt, sær, at øll ganga saman í samstarv. Tað skulu vit eisini gera. Men fyri at vit kunnu gera tað, má Føroya Løgting hava evsta vald í hesum landi. Hetta fer at taka tíð, men soleiðis er við øllum: Tað skal taka ta tíð, tað tekur.

Sjálvstýrisflokkurin fer at virka fyri, at Føroyar fáa sjálvstýri, tá ið rætta løtan er komin. Tað eigur ikki ganga út yvir einstaklingin á nakran hátt, men skal fremjast við skili, soleiðis sum vit sjálv vilja, tá ið tíðin er búgvin.

Eru vit búgvin til sjálvstýri, tá ið Føroya Løgting seinasta dagin seinastu setuna tyngdi fíggjarlógina við stívliga 70 mill. kr., uttan at tað hevði fingið líkinda parlamentariska viðgerð, og uttan at nøkur tilsvarandi inntøkulóg varð samtykt? Hetta er í mínum eygm ábyrgdarloysi og átti ikki at kunnað latið seg gjørt. Á henda hátt eru vit sjálvir okkara verstu fíggindar.

Sjálvstýrisflokkurin fer at virka fyri, at Føroyar fáa sjálvstýri við skili, tá ið rætta løtan er komin!

Setið ein sterkan Sjálvstýrisflokk inn á Føroya Løgting, tí svíkur miðjan, nytta endarnir einki!

# Ósatt verður ikki satt

**Jónas Johnsson**



- "Sigur tú lygnir nóg oftani, verða tær sannleiki." Hetta skrivar valevni sambandsins í Dimmu 22/3. Nei, lygnin gerst ikki sannleiki, um ofta endurtikin. Annað er, at lygnir villeiða, so at fólk at enda trúgva lygnini. Hann spyr seinni: "Er tað kanska ófrælsi at røkja uppgávur fyri Ríkið?" Nei, tað eru uppgávur fyri Føroyar. Signalið er lygnin. Uppgávulyndið. Bukka og knela fyri sømdir. Avreiða frumrætt fyri myntir. Til síðst nýtir hann A4 arkið til arging. Eg frykti at unglingin er ólekjandi inpotaður. Hugsið tó sjálv! Tað nýtist ikki at leypa úr leypi í annan. Miðjan hevur góð boð uppá verulig framtøk og virðiliga vælferð í sunnum samstarvi.

- Oddagreinin í Dimmu 28/3 var ikki mætari. Hon var, sum rímuligt er, um páskahøgtíðina. Men til síðst skrivar ónevndi: "Kristindómur hvørki kann ella eigur at vera fyri hin einstaka;." Eg var paff. Hetta eru 180 stig øvugt av tí, eg havi lisið og lært. Grundgevingin var: "at har, sum tvey ella trý koma saman í navni hansara, har skal hann vera teirra millum". Dimma misnýtir hetta ríka lyftið. Hvussu ljóðar: "har eitt, tvey ella trý eru saman"? Kann einsamallur vera saman? Betur var at endurgivið Johs. 3,16. Bíblian styðjar als ikki Dimmalætting í pástandinum. Tað vita lesararnir. Ósatt verður ikki satt, líkamikið hvussu drúgvar endurtøkurnar verða. Ei heldur lukkaðust mest endurgivnu orð Oliver Effesøes, sála, at gerast "sannleiki", hóast tað, at nógvir danir sera leingi trúu honum.

- Ein triði sambandsmaður lýsir sína áskoðan 22/3 í Sosialinum. "at tey rættindi, vit eiga í ríkisfelagsskapinum, eru so virðismikil fyri okkum føroyingar, at tey eiga vit at halda fast um, so leingi vit hava tey fyri neyðini." Hann sigur sum er, og tað er í lagi. Einki er innpakkað: "so leingi vit hava tey fyri neyðini". Vit skulu bara arbeiða fyri ikki longur at hava tey fyri neyðini. Hvussu barnið skal eita, goyma vit Føroya fólki at avgera - tá valið ikki verður stýrt av ótta fyri svangligum ófrælsi. Ikki allastaðni er nóg gott, minni enn so. Heldur ikki í Danmark. Men vit velja føroyska vælferð og skilagóðar avtalur - eisini við Danmark. Men tær eiga ikki at verða bornar av snúltarí, sum er nær slekta við tjóvarí.

- Ein fjórði sambandsmaður frøddi seg nú um dagarnar, tí fiskaprísirnir eru lækkandi, tí hann meinti, at tað vil geva Sambandsflokkinum eitt gott val. Hann náði og forbarmi seg fyri hugburð. Veljið heldur tað virðiliga!!

- Vit eiga Landið, X við lista D.

# Sjálvstýrisflokkurin í centrum

**Kári P. Højgaard**
*løgtingsmaður Sjálvstýrisfloksin*



Nú teir stóru flokkarnir Tjóðveldis og Sambandsflokkurin royna at markera seg við loysing - samband, kann skjótt henda, at miðjan dettur niður ímillum. Tað verður onki minni enn ein vanlukka, um Sjálvstýrisflokkurin, sum hevur verið ein miðdepul í føroyskum politikki í nærum eina øld, blívur burtur í hesi polarisering.

Góðu veljarar, lati tykkum ikki blinda av hesum tosi, tí øll stig sum tikin verða komandi valskeið, verða innanfyri rammurnar av heimastýrislógini.

Sjálvstýrisflokkurin stendur fyri eini hóvligari stig fyri stig loysn, sum aðrir flokkar nú eisini síggja sum einastu loysnina og royna at eftirlíkna. Hví so ikki velja orginalin?

Sjálvstýrisflokkurin hevur verið við til at sett síni positivu spor í seinastu samgongu, eitt nú við batanum av fólkapensjónunum.

Ein atkvøða til Sjálvstýrisflokkin er eitt val av góða, gamla, kenda og trygga flokkinum, sum eisini hevur framskrúvu og nýhugsan.

Sjálvstýrisflokkurin ger góðar tíðir betur.



## VIÐMERKINGAR

# Sambandsflokkurin atkvøddi ikki fyri at lækka blokkin

**(svar til Eyðólv Dimon)**

**Helgi Abrahamsen**



Eyðólvur Dimon skrivar í bløðunum týsdagin, at tá løgtingið atkvøddi við 2. viðgerð í málinum um at lækka blokkin, atkvøddi Sambandsflokkurin fyri uppskotinum. Men við 3. viðgerð hevði tað líkasum eydnast Javnaðarflokkinum at "yvirtala" Sambandsflokkin til at atkvøða ímóti.

**Veruleikin er ein annar**

Atkvøðugreiðslan við 2. viðgerð (tingmál nr. 75/2001) var tann 13. mars 2002. Allir seks tinglimirnir hjá Sambandsflokkinum atkvøddu ímóti at lækka blokkin.

Atkvøðugreiðslan við 3. viðgerð var tann 15. mars 2002. Aftur hesuferð atkvøddu allir seks tinglim irnir hjá Sambandsflokkinum ímóti, meðan til dømis Helena Dam á Neystabø úr Javnaðarflokkinum atkvøddi blankt.

- So vóni eg, at hatta er komið uppá pláss.

# Skipað lív, heilsa og dagliga lívið v.m.

**Hans Birgir Hansen**



Tað er mangt at avklára í øllum lívsins viðurskiftum og dagligum fyribrigdum. Ein má skipa lív, heilsu, vælveru, arbeiði, forrætning, frítíð og privatlív v.m.

Tað hevur støðugt gingið framá hesi seinastu árini, tá ein hevur skrivað lesarabrøv til bløðini. Hetta hjálpti uppá støðuna, ið fekk arvafíggindar at ignorera ein.

Tað hava verið byrjunartrupulleikar við øllum etableraðum lívsviðurskiftum og dagligum fyribrigdum, so sum lívið, heilsu, vælveru, arbeiði, forrætning, frítíð, privatlívið.

Tað hevur kostað ómetaliga nógv at náa tað støði, ein í dag er komin á. Ein hevur verið fyri fíggjarligum tapi vegna lívslanga arvastríðið í Havn.

Tað eru nógvar uppgávur, ið liggja á láni at fáa loyst, við atliti til alt tað, ein tekst við í tí dagliga lívi og í forrætnings, frítíðar, privatlívi her í Havn.

Tað er neyðugt, skal ein koma víðari í dagliga arbeiðs-, forrætnings-, frítíðar-, privatlívið her í Havn og fáa etablerað forrætningsavtalur/-sambond.

Tað verður ein harður kostur at liva sum ein býarmynd í Havnini í øllum tí áðurnevnda. Ein ynskir at sleppa frá tí ráða mannalyndinum.

Tað er nógv, ein skal avklára við arbeiðsmarknaðin, búskapin, samfelagið, húsarhaldið, handils- og vinnulívið, ídnaðin v.m., ið hevur eins stóra áhuga.

Tað skal støðugt ganga fram á í komandi tíðum við at skunda undir tær ráðandi kreftir, myndugleikar, vøld, almenningar ein stríddist við.

Tað er gott mót, ein hevur uppá lívið, og ein lærir so leingi ein livir og virkar og gevur sína lívsvitan og royndir til blaðlesarar kring landið.

Vit skulu øll greiða egnu lívsviðurskiftir og skipa lív, heilsu, arbeiðs, forrætnings, frítíðar, privatlív.


**Næmingar til Føroya Banka**

## Set framtíðina í bankan

Vit leita eftir nøkrum ungum, ágrýtnum fólkum, sum skulu vera við til at varðveita Føroya leiðandi peningastovn á fremsta plássi. Vilt tú vera ein av okkum, so kunnu vit bjóða tær eitt avbjóðandi og læruríkt næmingapláss í einum áhugaverdum og spennandi umhvørvi.

Vit vænta, at tú ert arbeiðssamur/-som, og at tú dugir at arbeiða saman við øðrum.

Tað er fyritreyt, at tú hevur staðið HH, HF, student ella líknandi.

Send umsóknina í seinasta lagi 19. apríl 2002 til:

**Føroya Banki**
*Postsmoga 3048*
*110 Tórshavn*
Att.: Bjarki Mohr

Skriva eitt sindur um, hví vit skulu velja júst teg. Við umsóknini skalt tú senda

- prógv frá loknari skúlagongd
- ummæli frá møguligum øðrum størvum

Les meira á heimasíðu okkara: www.foroyabanki.fo
Hevur tú annars okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi, so send ein teldupost til: bjarki.mohr@foroyabanki.fo

*Ætlandi verða næmingar settir á deildum bankans í Sandoy, Tórshavn, Klaksvík og Vágunum*



FØROYA BANKI